**Á hesi síðu hava vit spurt teir landspolitikarar í Norðoyggjum, sum enn ikki hava verið nógv frammi við síni hugsan, hvussu teir eru nøgdir við gongdina í tunnilsverkætlanini tvørtur um Leirvíksfjørð. Fyriuttan Heina O. Heinesen, sum hevur verið í fjølmiðlunum við síni hugsan, viðmerka her Jákup Mikkelsen og Jógvan við Keldu úr Fólkaflokkinum saman við Vilhelm Johannesen úr Javnaðarflokkinum**

# Útjaðarin gloymdur

**Vilhelm Johannesen, tinglimur Javnaðarfloksins í Norðoyggjum, vísir á tørvin at endurnýggja tunnlarnar til smábygdirnar í Norðoyggjum, um øll skulu fáa gagn av undirsjóvartunlinum um Leirvíksfjørð**

NORÐOYATUNNILIN
*Heini í Skorini*


*Vilhelm Johannesen heldur, at umframt arbeiðið um Leirvíksfjørð skuldi smærru tunnlarnir til smábygdirnar í Norðoyggjum eisini verið betraðir*

- Vinnumálaráðið hevur almannakunngjørt, at verkætlanin skal vera liðug í 2006, og um tað heldur, eri eg ógvuliga fegin og væl nøgdur, sigur Vilhelm Johannesen, tingmaður í norðoyggjum fyri Javnaðarflokkin.

Vilhelm Johannesen vísir víðari á, at týdningarmikið er at geva verkætlanini ta tíð, sum krevst, so almennu íløgurnar ikki gerast ov høgar.

### Betra tunnlar til smáu bygdirnar

Vilhelm Johannesen vísir tó víðari á eitt hugskot, sum ikki hevur verið serliga sjónligt higartil, men sum samstundis er ein sera kostnaðarmikil ætlan.

Umframt at fáa fast samband millum Norðoyggjar og Eysturoynna, ynskir Vilhelm Johannesen at betra tunnlarnar til smáu bygdirnar norðan fyri Klaksvíkina.

- Tunnlarnir úr Klaksvík og norður til smábygdirnar norðanfyri eru í sera vánaligum standi, og átti hetta arbeiðið at verið knýtt at stóru verkætlanini um Leirvíksfjørð, sigur Vilhelm Johannesen. Grundgevingarnar eru tær, at bergholini eru gomul, lág og hava bert eina koyribreyt.

- Tunnlarnir eru frá 60´unum, og um allar bygdirnar í Norðoyggjum skulu njóta gott av Norðoyatunnlinum, er neyðugt at betra viðurskiftini til útjaðaran eisini, og hetta arbeiðið skuldi verið knýtt at undirsjóvartunnlinum.

Um Vilhelm Johannesen tekur munnin ov fullan við hesum útsøgnum miðskeiðis í eini verkætlan á umleið 400 mió. krónur umframt at talan í løtuni er um búskaparligar niðurgongutíðir, skal vera ósagt, men talan verður í øllum førum um stórar og kostnaðarmiklar ætlanir, um ynskir hansara skulu verða gingin á møti.

### Upplýsingar vanta

Vilhelm Johannesen slær fast, at hann higartil er nøgdur við gongdina, og heldur hann ikki orsøk vera fyri atfinningarsomu røddunum viðvíkjandi keypi/ognartøku av jørðini í Klaksvík. Tó heldur hann lítið um upplýsingarviðurskiftini.

- Ein atfinning er vantandi upplýsingar til norðoyingar og Føroya fólk, og hetta eigur at betrast ongantíð ov skjótt, heldur Vilhelm Johannesen at enda.

# Tjóðveldismenn forða

**Jákup Mikkelsen, tingmaður Fólkafloksins í Norðoyggjum, heldur, at ivin, sum hevur verið sáddur í sambandi við Norðoyatunnilin, er ógrundaður, og at talan støðugt hevur verið um tjóðveldismenn, sum hava sett kílar í verkætlanina**

NORÐOYATUNNILIN
*Heini í Skorini*

Jákup Mikkelsen heldur ongan iva vera um, at ferð kemur á verkætlanina við Norðoyatunnlinum í heyst, og at tann ivi, sum er sáddur, í stóran mun er uttan nakrar haldgóðar grundgevingar.

- Sambært ætlanini og teimum upplýsingum, sum fyriliggja, verður farið í gongd við sjálva boringina seinast í hesum árinum, og tað er at fegnast um.

Jákup vísir á, at politiski myndugleikin hevur gjørt allar samtyktir og givið P/F Norðoyatunnlinum allar heimildir, og tískil eru allir karmar skaptir til tess at fullføra kostnaðar- og kravmikla arbeiðinum.

### Tjóðveldismenn forða

Nakrar skuldsetingar og hóttanir hava verið at sæð í sambandi við Norðoyatunnilin, og av hesum hevur ivi staðist um ymisk mál í verkætlanini. Jákup Mikkelsen vísir á, at í hesum sambandi hava serliga tjóðveldismenn týggja sær illa.

- Við tað at Fólkaflokkurin umsitir hetta málið, hava tjóðveldismenn við politiskum og taktiskum snildum roynt at sáa iva og finnast at ymsum, uttan at hesar skuldsetingar hava verið grundgivnar, sigur Jákup Mikkelsen. Hann sipar við hesum fyrst til, at SEV stjórin, Klæmint Weihe, ikki fekk loyvi at halda fram, umframt at Heini O. Heinesen fleiri ferðir hevur hótt við samgongusliti orsakað av ónøgd síni.

- Um nakar vandi er við slíkari verkætlan, so er tað júst hesin framferðarhátturin hjá ávísum tjóðveldismonnum, tí slíkt skaðar samlaðu verkætlanina, heldur Jákup Mikkelsen. Hann vísir eisini á, at talan gerst um eina politiska óstabila støðu, og tað er tað seinasta einum nýtist, tá so stórt arbeiði skal gerast.

### NCC hildið fram

Jákup Mikkelsen vísir eisini á, at NCC, sum stóð fyri arbeiðinum í Vágatunlinum, eisini skuldi fingið ábyrgdina av arbeiðinum tvørtur um Leirvíksfjørð.

- Nógv tíð hevði verið spard, um NCC beinanvegin varð sett til upp-gávuna, tí samfelagið missir nevniliga pening fyri hvønn dag, sum fer. Um hetta hevði verið avgreitt, høvdu vit møguliga verið komin longri við verkætlanini í dag, sigur Jákup Mikkelsen.

Hann vísir á, at missurin í tíð kann vera eitt hálvt til eitt ár, og at man í seinasta enda kann missa meiri fyri minni.

### 30-50 mió. í árligum vinningi

Jákup Mikkelsen leggur eisini afturat, at samfelagsligar metingar og útrokningar vísa ein vinning á 30-50 mió. krónur, um ein undirsjóvartunnil verður gjørdur.

- Munurin á einum undirsjóvartunnli og ferjusigling er sera stórur. Umframt at siglingin sjálv tvørtur um fjørðin tekur ein hálvan tíma, fer sera nógv tíð at bíða, og er hetta til stórar útreiðslur fyri fyritøkurnar í Norðoyggjum.


*Jákup Mikkelsen fegnast um, at arbeiðið við Norðoyatunlinum tykist fara í gongd í næstum, og vísir hann á stóru samfelagsligu ágóðarnar av hesum*

Jákup Mikkelsen leggur dent á, at framleiðslan má steðga fyrr og tekur longri tíð at koma til meginøkið, umframt at lønarútreiðslurnar eru nógvar til fólk, sum í arbeiðstíð ferðast ímillum.

- Tá er munur á teimum seks minuttunum, tað í framtíðini tekur at koyra úr Leirvík til Klaksvíkar, sigur Jákup Mikkelsen at enda.

# Ikki nóg professionelt

**Jógvan við Keldu, tinglimur Fólkafloksins í Norðoyggjum, heldur, at Partafelagið Norðoyatunnilin ikki er líka professionelt sum P/F Vágatunnilin var. - Ikki minst orsakað av, at Klæmint Weihe ikki longur er nevndarformaður, sigur Jógvan við Keldu**

NORÐOYATUNNILIN
*Heini í Skorini*


*Jógvan við Keldu heldur ikki, at arbeiðið við Norðoyatunnilinum er eins professionelt, sum tað var, tá Vágatunnilin var í gerð*

Jógvan við Keldu var bakmaður fyri uppskotinum um undirsjóvartunnil til Klaksvíkar í 1987, og tá vóru bert 10-20% av tingmanningini fyri uppskotinum. Í dag er verkætlanin so í gongd, men Jógvan við Keldu hevur ikki bert ljósareyður og bjartskygdar viðmerkingar til arbeiðið higartil.

### Saknar Klæmint Weihe

Jógvan við Keldu harmast um, at sama nevndin ikki slapp at halda á frá P/F Vágatunnlinum.

- Ein sera stórur kapasitetur varð tikin úr nevndini, tá Klæmint Weihe ikki kundi halda fram sum nevndarformaður. Tað tykist, sum kontinuiteturin ikki er tann sami nú sum í P/F Vágatunnlinum, eru avgjørdu viðmerkingarnar hjá Jógvan við Keldu.

Hann vísir víðari á, at sum næst størsti aktionerur í SEV skuldi Klaksvíkar Kommuna mótmælt avgerðini hjá umboðsráðnum í SEV ikki at lata áðurnevnda Klæmint Weihe halda á.

### Hildið fast við NCC

Eitt annað atfinningarsamt øki er sambært Jógvan við Keldu avgerðin um, hvør fyritøka skal standa fyri arbeiðnum.

- Eftir mínum tykki skuldi P/F Norðoyatunnilin hildið fast við NCC, sum stóð fyri arbeiðnum við Vágatunnlinum, at taka sær av arbeiðnum. Tað hevði avgjørt verið besta loysnin, sigur tingmaður fólkafloksins í Norðoyggjum.

Jógvan við Keldu leggur afturat, at hann eisini segði við flokk sín, at arbeiðini ikki skuldi verið bjóðað út aftur.

### Ov lítil upplýsing

Eins og onnur eisini hava víst á, er Jógvan við Keldu ikki nøgdur við vantandi upplýsingarnar til almenningin.

- Vegna vantandi upplýsingunum frá partafelagnum, standast leysasøgur og gitingar, og so skjótt sum fólkið ikki hevur hoyrt nakað eitt tíðarskeið, fara leysatíðindi í gongd um bæði eitt og annað, heldur Jógvan við Keldu.

Fyri at bøtt um upplýsandi arbeiðið nevnir Jógvan eina heimasíðu ella opnar, upplýsandi fundir við jøvnum millumbili.

### Óprofessionelt

Samanumtikið heldur Jógvan við Keldu, at talan stutt sagt ikki hevur verið um eins professionell viðurskifti, sum tá Vágatunnilin var í gongd.

- Ein hevur eina kenslu av, at arbeiði ikki er á sama støði sum tá, tí ymisk viðurskifti liggja á láni. Hetta skuldi P/F Norðoyatunnilin tikið til eftirtektar, endar Jógvan við Keldu.



# Framkomið skip

**Tað skal framkomin útgerð til, tá ein 1.400 km. kaðal skal leggjast í Atlantshavi**

KAÐALSKIP
*Heri á Rógvi*


*F.v. Andras Róin, stjóri fyri Føroya Tele, Jón Birgir Jónsson, nevndarformaður fyri FarIce, og Suni Joensen, leiðari fyri FarIce verkætlanina hjá Føroya Tele. Teir eru avmyndaðir kaðaldekkinum á Pertinaciu*
*Mynd: Heri á Rógvi*

Kaðalskipið Pertinacia, sum vitjaði í Føroyum um vikuskiftið, er bert eitt ára gamalt. Byggikostnaðurin var umleið 325 mió. kr. Av teimum fór ein stórur partur til at keypa framkomna útgerð at leggja kaðalin við.

Skipið er 8.000 bruttotons, og tann 1.400 kilometrar langi FarIce kaðalin fyllir í mesta lagi eina lítla helvt av kaðallastini á skipinum.

Í Sosialinum týsdagin var stór frásøgn, men orsakað av tekniskum trupulleikum komu ongar myndir umborð av skipinum við. Tískil prentað vit nakrar í dag.

Pertinacia heldur áfram til Seyðisfjarðar til einaferð í september. Lagt varð til brots 26. juni í Skotlandi. Sjálv handanin av kaðalinum frá veitaranum Pirelli til eigaran verður ikki fyrr enn í november.

Sjálvur kaðalin verður grivin niður í Havbotnin – umleið 1,5 metur. Skipið verður stýrt av einari satellit skipan, sum altíð heldur skipinum upp á pláss.

Nýggi FarIce kaðalin skal eftir ætlan nøkta tørvin á fjarskiftinum við umheimin hjá føroyingum og íslendingum tey næstu 25 árini.

*Hetta er sjálv plógvin, sum gravar kaðalin niður í Havbotnin. Frá brúnni á skipinum verður alt stýrt, og eitt videotól er eisini á plógvini*
*Mynd: Heri á Rógvi*



# Tríggjar listamilliónir

**Komandi tólv dagarnar verða tríggjar milliónir nýttar til mentan á Listastevnuni**

LISTASTEVNAN
*Heri á Rógvi*


*Helga Hjørvar heldur, at føroysk listafólk skulu fáa góðar samsýningar fyri at vera við á Listastevnuni, men tað er heldur ikki uttan treytir*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Samlaða fíggjarætlanin fyri Listastastevnuna 2003 er umleið tríggjar millíónir krónur. Hesar tólv dagarnar í august verða sostatt tríggjar milliónir nýttar til mentan – list – meðan Listastevnan er.

Fíggjarætlanin er á leið tann sama sum tær báðar undanfarnu Listastevnurnar. Men hvar kemur hesin peningurin frá? Listastevnan er eitt sjálvstøðugt tiltak, sum í prinsippinum fíggjar seg sjálvt, men tað er Norðurlandahúsið, ið eigur fíggjarligur ábyrgdina.

Umframt Norðurlandahúsið spýtir eisini Tórshavnar kommuna og Mentamálaráðið í. Eisini hevur tað eydnast at fáa stuðul frá Nordisk kulturfond aftur í ár. Ymsir føroyskir sponsorar, t.e. føroyskar fyritøkur á ymsan hátt, og atgongumerkjasøla gera, at tað ber til at skipa fyri Listastevnu Føroya fyri tríggjar milliónir. Býtið er soleiðis, at ein triðingur ella ein góð millión er Norðurlendskur stuðul, ein triðingur føroyskur stuðul og ein triðingur fæst til vega umvegis atgongumerkjasølu.

Stjórin fyri Norðurlandahúsið, Helga Hjørvar, sigur, at Listastevnan so avgjørt er eitt av teimum størstu tiltøkunum, sum Norðurlandahúsið hevur verið partur av.

Hon fegnast í sambandi við hesa stevnuna serliga um, at áhugin hjá føroyskum fyritøkum at stuðla Listastevnuni er vaksin.

### Eftir í Føroyum

Av teimum trimum milliónunum verður nógv nýtt til at gjalda teimum nógvu útlendsku listafólkunum fyri ómakin, men ein stórur partur av peninginum verður stoyttur í føroyska pengingarenslið.

Eitt nú fer ein hálv millión til flogferðaseðlar, sum fyri tað nógva verður avgreitt í Føroyum. Eini 200.000 krónur fara til føroysk gistingarhús, upplýsir Helga Hjørvar.

Eisini føroysk listafólk fáa líkinda samsýningar frá Listastevnuni.

Eg skilji ikki fólk, tá tað verður sagt, at tað skal vera bíligari, tá tað eru føroysk listafólk. Tey skulu hava somu sømdir sum hini, sigur Helga Hjørvar.

Men tað er ikki uttan treytir, at Listastevnan rindar góðar lønir.

Tað skal vera nakað serstakt, sigur Helga Hjørvar.

Sum dømi kann nevnast, at Listastevnan ikki vildi ganga við til, at Gestir spældu við á ólavsøkukonsertini.

Tað skal eisini sigast, at útlendsku listafólkini oftani eru ógvuliga lagalig við prísum, og tey krevja aloftast nógv minni, enn tey høvdu kunna fingið aðrastaðni fyri at standa á palli í Føroyum.

### Prísir

Listastevnan hevur seinnu árini verið nógv kritiserað fyri prísirnar á atgongumerkjunum. Tað hevur eitt nú verið uppi og vent, at summi tiltøk hava verið illa vitjaði, har atgongumerkjaprísurin hevur verið høgur. Og tað vildi verið ólíka nógv betri við lægri prísum og fleiri fólki.

Men Helga Hjørvar heldur ikki, at prísirnir eru ov høgir.

– Tá fólk vilja keypa atgongumerkir, so kunnu vit eisini vísa yvirfyri okkara stuðlum, at tað er áhuga fyri hesum. Eg haldi, at vit eru ógvuliga afturhaldandi við okkara prísum. Tak eitt nú Ósjónliga sirkusið, sum kostar 550 kr. fyri vaksin í Norra og 250 í Føroyum, sigur Helga Hjørvar, sum vísir á, at eitt stórtfingin ókeypis tiltak verður á nýggja bygninginum hjá Landssjúkrahúsinum.

**Fakta**

## Listastevnan

| | |
|---|---|
| Samlað fíggjarætlan: | uml. 3 mió. kr. |
| Norðurlendskur stuðul: | uml. 1 mió. kr. |
| Atongumerkjainntøku (mett): | uml. 1 mió. kr. |
| Føroyskur stuðul: | uml. 1 mió. kr. |
| Tal av útlendskum luttakarum: | uml. 100.000 kr. |
| Útreiðslur til flogferðir: | uml. 500.000 kr. |
| Útreiðslur til gisting: | uml. 200.000 kr. |